Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Átøk at bjarga og varðveita føroyska rossastovnin

Spurningar

1. Hvat krevst av lógarbroytingum fyri, at føroysk ross kunnu útflytast?
2. Hvørjar lógarbroytingar skulu gerast, fyri at føroysk ross kunnu verða skrásett á góðkendan hátt og ein myndugleiki ella felag fáa heimild at vátta upplýsingarnar í rossapassum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at fáa hesa lóggávu gjørda og um ja, nær kann tað væntast?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til stuðul til at varðveita føroyska rossið?
5. Ætlar landsstýrismaðurin at gera ein miðvísan alipolitikk fyri at tryggja framtíðina hjá føroyska rossastovninum?

Viðmerkingar

Fyri nógvum árum síðani varð farið undir at varðveita serføroyska rossið, sum var nærum útdeytt. Føroyar hava sambært ST-sáttmála bundið seg til at at verja lívfrøðiliga margfeldið. Føroyska rossið er eitt av gomlu serføroysku húsdýrasløgunum, og harvið fevnt av sáttmálanum.

Felagið Føroysk Ross (FFR) upplýsir á heimasíðu síni, at í verandi løtu eru 94 ross av serføroyskum slag, tá fyl og geld ross eru íroknað. Umframt eini 500 útlendsk ross.

Støðan hjá føroyska rossinum er sera álvarsom. Ov fá fyl verða folað árliga vegna mettaðan marknað í Føroyum. Tað eru einans umleið 25 ryssur í burðarførum aldri, og av hesum eru tað uml. 7-10 ryssur, sum verða brúktar í aling. Sambært The Food and Agriculture Organization (FAO) skal stovnurin av aliryssum upp um 1000 ryssur fyri ikki at vera hóttur.

Neyðugt er at skipa eina effektiva aling, ið varðvetir genetiska fjølbroytnið. Í 2018 vórðu 13 fyl av føroyska rossaslagnum folað, sum var met, men árini eftir hetta 6-7 fyl árliga, og í 2022 væntast bert hitt eina fylið, ið er lægsta talið síðan 1990. Alarar tora ikki at seta við, tí vandin fyri ikki at sleppa av við fylini er ov stórur.

Ein loysn á trupulleikanum, sum FFR hevur víst á, er at fáa loyvi at útflyta føroysk ross, so eisini ber til at ala hesi uttanlands. Eitt nú í Danmark er eftirspurningur eftir føroyskum rossum. Í løtuni vantar lóggáva um at skráseta ross, og tí hevur eingin myndugleiki ella felag í Føroyum heimild til at vátta upplýsingarnar í rossapassum.

Ein lítil játtan er á fíggjarlógini til stuðul til at varðveita føroyska rossið, men pengarnir strekkja ikki langt, og eldsálir brúka tí nógvan pening úr egnum lumma fyri at varðveita stovnin.

Á Løgtingi 26. oktober 2021

Bjørt Samuelsen